# Nýsettur aðalstjóri í Almenna- og Heilsumálaráðnum




*Komandi aðalstjórin Poul Geert Hansen og Hans Pauli Strøm*

**Poul Geert Hansen er settur sum nýggjur aðalstjóri í Almenna- og Heilsumálaráðnum. Hann kemur at virka í starvinum frá 14. august.**

*Johan Jacobsen*
*johan@sosialurin.fo*

Hann hevur m.a. starvast sum leiðari fyri Stuðulsstovninum og fíggjarfulltrúi í Landsskúlafyrisitingini. Og frá 1996 til 2002 var hann í starvi í Norðurlendska Ráðharraráðnum í Keypmannahavn. Men seinastu fýra árini hevur Poul Gert Hansen verið sjúkrahússtjóri á Landssjúkrahúsinum.

– Jú, hetta verður eitt avbjóðandi starv. Og hetta er eisini eitt sera týdningarmikið øki í føroyska samfelagnum, og tað skal vera væl virkandi. Vónandi fara vit at klára at flyta tað so ella so tann rætta vegin.

Til spurninginum um hvørjar væntanir Poul Geert Hansen hevur til nýggja starvið, metir hann at tað ikki altíð fer at verða so lætt at reka hesa uppgávuna.

Ein týðandi uppgáva, sambært nýsetta aðalstjóranum, verður at finna tørvin hjá borgaranum og skulu ymisk hagtøl verða nýtt og eisini royndir úr útlandinum.

### Betri samskiftið

Poul Geert Hansen fer úr starvinum sum sjúkrahússtjóri, so hann hevur avgjørt ávísar royndir innan hetta málsøkið. Men hann eftirlýsir eitt betri samskifti millum tær ymisku eindirnar, ið hava við heilsmál at gera. – Vit mugu í størri mun tora at seta týðulig krøv, soleiðis, at hin parturin kennir sína uppgávu og mál betri. Hetta skal eisini koma fram í politiska kjakinum. Men í síðsta enda verður tað ynskini hjá borgarunum, ið skulu viga mest.

Men í framtíðini sær komandi aðalstjórin stóra avbjóðing í tí, at útreiðslurnar á økinum vaksa í størri mun enn búskaparvøksturin ger tað. – Vit verða jú noydd at fylgja við tí politisku skipanini og væntandi fer trýst koma á hetta málsøkið í framtíðini, men har er sjálvsagt eitt mark fyri sparingum. Tað hevur stóran týdning at vit vita hvat vit brúka orkuna uppá, slær Poul Geert Hansen fast at enda.

### Ráðið skal hava neyðugu arbeiðsorkuna

Funnist hevur verið at samanleggingini av báðum almenna- og heilsumálunum saman, men landsstýrismaðurin í Almenna- og Heilsumálum, Hans Pauli Strøm, heldur fast um at hetta var rætta avgerðin. – Vit høvdu júst nú ígjár eitt gott dømi um hetta á einum landsstýrisfundi, har málið snúði seg um eitt heim fyri sinnisveik í Suðuroy. Í hesum málinum var ein samanrenning millum ymisk fakøkir, sum vit hava við at gera í Almenna- og Heilsumálaráðnum. Men ein treyt er, at ráðið hevur orku til at arbeiða við tí, hetta er umráðandi.

Hans Pauli Strøm er í løtuni virkandi løgmaður. – Hetta er ein stuttlig kensla, men ítøkiliga so merki eg tað ikki.



## Viðmerking frá fyrrverandi aðalstjóranum

Sigur í stuttari viðmerking við blaðið, at hon ynskir nýggja aðalstjóranum alt tað besta. Í hennara starvstíð fóru nógvar bygnaðarbroyting fram á hesum málsøkinum, hetta órógvaði sera nógv arbeiði. – Men hetta málsøkið er jú eitt tungt málsøki at røkja, eisini politiskt.

Serliga er tað lógarkarmarnir, sum skulu fáast uppá pláss og var hetta ofta ein kelda til nógv høvuðbrýggj. – Tað er serliga tey akuttu málini, sum koma inn. Tey hava verið trupul at loyst. Og her er tað ikki nøktandi lógarkarmar kring málsøkið.

Og, sum Aibritt orðar seg, so er tað ikki bara nakrar broytingar, sum skulu gerast. – Forsorgarlógin skal gerast av nýggjum, hon er grundarlagið undir øllum almennaverkinum. Eitt dømi um, at lógarkarmarnir ikki eru nøktandi sóu vit nú í fyrru viku. Hetta málið hevði samband við stuðulsskipanina.